gult cyan magenta svart



# Innandura kapping hjá HB

**Fyri góðari viku síðani skipaði HB fyri stórari innandura kapping í Ítróttahøllini á Hálsi**

INNANDURA FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hetta er tíðin, har innandurafótbólturin herjar kring landið, og komandi mánaðirnar verða fleiri størri og smærri kappingar fyriskipaðar kring landið.

Ein av teimum stóru í hesum sambandi mundi helst vera kappingin, sum HB skipaði fyri fríggja- og leygardagin, 17. og 18. november.

Ikki færri enn 80 lið høvdu boðað frá luttøku, og tá bert trý av hesum góvu avboð, vóru sjálvsagt nógir dystir, sum skuldu fáast frá hondini.

Lagt varð til brots longu fríggjadagin kl. 15, og síðani varð hildið á alt kvøldið. Leygardagurin varð eisini nýttur allur, sum hann var, og kl. 22 var so alt leyst og liðugt.

Frá fyriskiparunum frættist, at tað gekst væl at avgreiða kappingina, og at talan var um lítlar ella nærum ongar seinkingar.

Niðanfyri verða prentaðar myndir av vinnandi liðunum, men av tekniskum ávum bar ikki til at fáa mynd av vinnandi liðnum í dreingjadeildini. Teir itu Hveistrar.



*Hjá teimum 12-14 ára gomlu vann HB*



*Kappingina fyri smádreingir vann FC Æsir*



*Hesir knassarnir úr AB vunnu piltadeildina*



*Gentubólkin, 10-12 ár, vann Brøndby*



*B68 vann smápiltadeildina*



*Kappingina fyri gentur 14-17 vann Sumba*




*Elsti bólkurin var fyri unglingar, og her vann Stenløse*




gult cyan magenta svart



# Konto IN kapping á Kambsdali

**Farna vikuskifti skipaði flogbóltsdeildin hjá ÍF fyri flogbóltskapping**

FLOGBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Leygardagin skipaði ÍF-flogbóltur fyri flogbóltskapping á Kambsdali. Henda kapping er fyrsta av sínum slag, sum flogbólturin há ÍF hevur skipað fyri.

Kappingin varð hlidin fyri bólkunum, dreingir og gentur 14. Hetta tí tað verður mett, at hesin aldursbólkurin fær ov fáar dystir í vetrarhálvuni, og at tað tí var ynskiligt, at hesi fingu fleiri dystir.

Føroya Banki, sum stuðlaði kappingini, lat heiðursmerki til trý tey bestu liðini, og har umframt fingu vinnandi liðini eisini steyp til ognar.

Kappingin eydnaðist sera væl, og í ÍF rokna tey við, at kappingin framyvir verður skipað á hvørjum árið.

Í alt luttóku 17 lið. 11 í gentubólkinum, har KÍF gjørdist vinnari, meðan Dráttur og SÍ gjørdust ávíkavist nummar tvey og trý.

Í dreingjadeildini luttóku seks lið. Her vann SÍ kappingina. Fleyr varð nummar tvey, meðan Mjølnir gjørdist nummar trý.

Her verða prentaðar myndir av vinnandi liðunum.




*KÍF vann kappingina í gentudeildini*




*Hjá dreingjunum vórðu tað sørvingar, sum vunnu*

# Grønlendsku menninir til HM

Fyri stuttum varð skrivað, at tað var einki minni enn ein sensatión, at grønlendska kvinnulandsliðið í hondbólti hevði vunnið seg fram til HM-endaspælið.

Fagnaðurin um heta er neyvan minni í Grønlandi, nú tað eisini er greitt, at manslandsliðið sleppur at spæla við, tá HM verður floyta ígongd.

Grønlendsku harrarnir høvdu annars ikki spælt seg fram til endaspælið, men tá Cuba hevur tikið sína luttøku aftur, stóð Grønland næst á listanum.

Flestum kunnugt, so spældi føroyska manslandsliðið tríggjar landsdystir móti tí grønlendska í vár. Tveir teirra endaðu við føroyskum sigri, meðan hin triði og seinasti endaði við javnleiki.

**jm**



*Grønlendska landsliðið sleppur nú at royna seg í HM-endaspælinum*




